# Tað leikaði hart á



*Tað kemur aldrin upp á tal, at fiskimenn fara at betala ein part av oljuútreiðslunum hjá skipunum. Soleiðis skal nýggi sáttmálin ikki skiljast, leggur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, dent á*

**Verkfallið hjá Fiskimannafelagnum endaði leygarkvøldið. Men tað kundi akkurát tað sama blivið drúgt, tí tað leikaði hart á. Spurningurin er, hvat vit høvdu fingið burturúr einum longri verkfalli, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum**

SEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg eri væl nøgdur við, at vit fingu ein enda á verkfallinum leygarkvøldið.

Tað staðfestir Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum.

Sostatt varð verkfallið ikki so drúgt, sum nógv høvdu fryktað fyri.

Men tað kundi tað akkurát tað sama blivið, tí tað leikaði hart á, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum.

Hann sigur, at tað er ein spurningur, hvat Fiskimannafelagið hevði fingið burturúr einum longri verkfalli.

- Spurningurin er, um tað, vit høvdu fingið burtur úr at longt verkfallið, hevði vigað upp ímóti teimum avleiðingum, tað hevði havt fyri samfelagið, tí tað kundi saktans enda við, at fleiri skip og virki fóru á heysin og tað hevði verið ein vanlukka fyri alt samfelagið.

### Fara aldrin at betala

Tað, sum serliga skilti partarnar, var tann umstrídda oljusemjan, sum varð gjørd í seinastu samráðing. Har stendur, at fer oljan upp um 2,90 krónur fyri liturin, skulu partarnir tosa saman um oljuútreiðslurnar. Tað, sum liggur í hesum er, at fiskimenninir skulu betala ein part av oljuni.

Men hetta noktaði Fiskimannafelagið blankt og tað er var ein høvuðsatvoldin til verkfallið.

Í nýggja sáttmálanum eru fiskimenninir slopnir undan at betala ein part av oljuni.

Ella eru teir nú tað?

Í nýggja sáttmálanum stendur, at partarnir skulu taka spurningin um útreiðslurnar til oljuna upp av nýggjum longu í ár.

Men formaðurin í Fiskimannafelagnum staðfestir, at tað verður ikki fyri at viðgera, hvussu nógv fiskimenn kunnu betala av oljuni.

- Tað fer ongantíð at koma upp á tal, at fiskimenn fara at betala ein part av oljuni, tí vit fara aldrin at betala fyri at sleppa til arbeiðis, staðfestir Jan Højgaard.

- Tað einasta, sum partarnir tískil skulu tosa um, er at fáa reiðararnar heilt at sleppa kravinum um at fiskimenn skulu betala ein part av oljuni.

Soleiðis skilir Fiskimannafelagið hesa ásetingina í nýggja sáttmálanum, sigur Jan Højgaard.

Meiri um hetta er á síðu 11.

---

# Barsilskipanin skal víðkast



Val X

**RÓSA SAMUELSEN**
Sambandsflokkurin

**Møguleiki skal vera at hava barsilsfarloyvi upp til eitt ár, so foreldrini hava møguleika at vera hjá barninum tað fyrsta árið**

Foreldur ið júst hava lokið útbúgving skulu hava rætt til stuðul frá barsilskipanini.

Heilsustýrið tilmælir at barnið fær bróstamjólk minst í eitt hálvt ár sum einasta føðslukelda, og WHO tilmælir, at barnið bert fær bróstamjólk í hálvt ár, síðan vanligan mat tilsvarandi barni og bróstamjólk í tvey ár. Hetta tí at bróstamjólk er heilsugóð føði fyri barni, og verjir barni fyri fleiri sjúkum, bæði í pinkubarnatíðini og seinni í lívinum.

Barnsburðarfarloyvi skal gerast meira rúmsátt, og møguleiki skal vera at leingja tað upp til eitt ár. Hetta ger so eisini, at barnið hevur møguleika at vera heima ta fyrsta árið og er meira mótstøðuført fyri sjúkum tá tað so kemur í vøggustovu millum onnur børn .

Arbeiðsmarknaðurin skal eisini gerast meira rúmsáttur. Mamman, ið má aftur til arbeiðist, skal hava møguleika at fara at geva bróst í arbeiðstíðini.

Fyri foreldur sum fáa barn, sum hevur en serligan tørv av einhvørji orsøk, tað kann vera brek ella sjúka, skal verða rúmd fyri at leingja farloyvi hjá báðum foreldum.




# Granskingarøki ein avbjóðing - eisini innan medisinska økið. Vit eiga at tora



Val X

**KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN**
Valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum

Í stevnuskránni hjá Sjálvstýrisflokkinum stendur at útbúgvingar- og granskingarætlanir, ið kunnu menna og skapa eitt fjølbroyttari vinnulív eiga at raðfestast høgt á landsins fíggjarlóg.

Vegna landafrøðiligu avbyrgingina hava vit í Føroyum góðar møguleikar at granska á eitt nú medisinska økinum og tora vit at taka av hesi avbjóðing, so kunnu vit lættliga byggja ein altjóða granskingarmiðdepil – við føroyskari og útlendskari fígging og vitan. Eini vitan, ið hevur altjóða marknaðin tøkan í somu løtu, sum úrslitini liggja á telduni.

Onnur granskingarøki liggja eisini og bíða eftir okkum. Føroysk vind-, aldu-, vatn- og ljósorka eru eisini øki, ið kunnu mennast á umhvørvisvinarliga økinum. Ein greið náttúruvernd er ein sjálvsagdur partur av hesum – tá ber til at fáa mennandi samspæl millum náttúru og orku.

Vit eiga at stuðla gransking og finna úrslit í einari føroyskari granskingarpark. Hesum torir Sjálvstýrisflokkurin at arbeiða fyri.

**Granska tína hugsan – vel Sjálvstýrisflokkin!**

# Hækkið lønirnar hjá heilsustarvsfólkum og fólkaskúlalærarum



Val X

**MARJUS DAM**
Sambandsflokkurin

**Okkara sjúkrasystrar og fólkaskúlalærarar eru undirløntir. Lønirnar til hesar starvsbólkar eiga at hækkast, so lønarviðurskiftini í Ríkinum er tann sami**

Vit hoyra um Sjúkrahúsverk og Fólkaskúla. Bæði støðini verða starvsfólk niðurgjørd so tað má níva tungt. Illa ber til hjá fleiri at svara aftur. Bæði støðini verður nógv og gott arbeiði gjørt.

Men onki kemur fram um, at bæði fólkaskúlalærarar og sjúkrasystrar als ikki fáa tað løn tey hava uppiborið. Lærarar og sjúkrasystrar fáa hægri løn í Danmark enn í Føroyum. Útbúgvingarnar eru á sama støði. Arbeiðið er tað sama, men lønin lægri í Føroyum. Er tað tí at mjølkin og breyðið kostar minni. Nei, lønin er bara lægri – fyri sama arbeiði.

Eg haldi, at lønirnar til hesar starvsbólkar eigur at hækkast munandi, so lønarviðurskiftini í Ríkinum er tann sami.

Um tað ikki verður gjørt nú, so er tað ein hóttan ímóti bæði Sjúkrahúsverki og Skúlaverki. Vit síggja ídag, at fleiri fólk innan bæði økini leita sær arbeiði annað stað. Og dýrir vikarar mugu keypast ístaðin.

Hækkið lønina – tí tey hava uppiborið at fáa minst somu løn sum teirra starvsfelagar.

**X viðMarjus Dam, Sambandsflokkurin**